# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Hendan stjórnin verður sitandi nú, og eg dugi ikki at siga, nær ein nýggj verður almannakunngjørd*

*(Anders Fogh Rasmussen)*

# Fogh vil hava breitt samstarv

**Hóast stjórnin kann halda fram við stuðuli frá øðrum umboðnum úr Føroyum, vil Anders Fogh Rasmussen fegin hava eitt breiðari grundarlag aftan fyri stjórnina**



*Anders Fogh Rasmussen hevði alla orsøk til at vera fegin um valúrslitið*



*Ny Alliance gjørdist ikki tann kollveltingin í donskum politikki, sum tær fyrstu ábendingarnar vístu. Tað sást eisini á floksformanninum í gjárkvøldið*

Stundum bendu tølini á, at Ny Alliance bleiv tungan á vágskálini, men tá tað vísti seg, at Sambandsflokkurin fekk annað umboðið í Føroyum, varð greitt, at stjórnin hjá Anders Fogh Rasmussen kundi halda fram við stuðuli frá Edmundi Joensen.

Men forsætisráðharrin vil eftir øllum at døma hava eitt breiðari grundarlag aftan fyri stjórnina, og tí boðsendi hann umboðum fyri Ny Alliance á fund longu í dag. Politiski viðmerkjarin Jørgen Goul Andersen vísir í samrøðu við Politiken á, at tað er bara føroyska umboðið, sum ger, at stjórnini ikki nýtist stuðul frá Ny Alliance, og tað heldur forsætisráðharrin ikki vera nóg góða grund til at vísa tí nýggja flokkinum frá sær. Harafturat vil Anders Fogh Rasmussen fegin vísa, at hann vil hava breitt samstarv aftan á valið.

Jørgen Goul Andersen og aðrir danskir viðmerkjarar eru á einum máli um, at Ny Alliance kann ikki seta tey stóru krøvini orsakað av úrslitinum í Føroyum.

-Ny Alliance er uttan iva sinnaður at gera neyðsemjur, og flokkurin kann heldur ikki krevja serliga høgan prís fyri sín stuðul, sigur Jørgen Goul Andersen við Politiken. Hann sigur, at Fogh vil fegin hava Ny Alliance við í stjórnarsamstarvið, men at hann fer neyvan at góðtaka treytaleys krøv.

Danski Fólkaflokkurin hevur longu sagt sína hugsan.

-Vit hava ikki brúk fyri Ny Alliance, segði Pia Kjærsgaard, floksformaður, í gjárkvøldið, tá úrslitið úr Føroyum var komið.

# Juliane vann stórsigur

**23 ára gamla Juliane Henningsen er yngsti limur í grønlendska Landstinginum. Nú er hon eisini fólkatingslimur**

Við 4.404 persónligum atkvøðum varð 23 ára gamla Juliane Henningsen úr flokkinum IA vald at umboða Grønland á Fólkatingi saman við Lars Emil Johansen úr Siumut, sum fekk 2.968 persónligar atkvøður.

Juliane Henningsen segði í gjárkvøldið, at hon fer at taka farloyvi frá arbeiðinum í Landstinginum, so hon kann røkja fólkatingsarbeiðið til fulnar.

IA og Siumut fingu ávikavist 7.107 og 6.658 atkvøður á valinum í gjár. Teir báðir borgarligu flokkarnir, Atassut og Demokratarnir, fingu ávikavist 4.004 og 3.436 atkvøður.



*Juliane Henningsen*

## STUTT SAGT

### Skutu fólk uttan orsøk

Embætismenn hjá amerikonsku samveldisløgregluni FBI eru komnir til ta niðurstøðu, at leiguhermenn hjá felagnum Blackwater skutu 14 irakar uttan nakra orsøk í einum tilburði í septembur. FBI sigur eisini, at framferðin hjá Blackwater var ikki í samsvari við tær reglur, sum eru galdandi fyri privat trygdarfeløg, sum hava fingið loyvi at virka í Irak. Leiðslan í Blackwater hevur hildið uppá, at leiguhermenninie skutu í sjálvverju, tá teir vórðu álopnir, men FBI sigur, at tað finnast eingi prógv fyri hesum. Ákæruvaldið í USA sigur kortini, at tað er ikki vist, at løgfrøðiligt grundarlag er fyri at stevna leiguhermonnunum fyri rættin.

### Hermenn skutu sivilfólk

Sjey polskir hermenn, sum eru í NATO-deildini í Afghanistan, eru tiknir og skuldsettir fyri at hava skotið sivilfólk og sostatt brotið altjóða fólkarættin, sigur BBC. Ein talsmaður hjá polska verjumálaráðnum sigur, at sambært ákærurittinum skutu polsku hermenninir fimm sivilfólk tann 16. august. Tilburðurin var tveir dagar, eftir at tann fyrsti polski hermaðurin var fallin í einum Talibanálopi, og tað elvir til illgruna um hevnd. Pólland hevur 1.200 hermenn í Afghanistan.

### Verkfall í Fraklandi

Starvsfólk hjá franska jarnbreytarverkinum fóru í verkfall í gjárkvøldið, tí tey eru midnøgd við nakrar broytingar í pensjónsskipanini, sum stjórnin ætlar at seta í verk. Undir valstríðnum fyrr í ár segði Nicolas Sarkozy, forseti, at hann fór at broyta pensjónsskipanina, bleiv hann valdur, og tað eru hesar broytingarnar, sum hann nú ætlar sær at fremja í verki. Umframt starvsfólkið í jarnbreytarkervinum hava starvsfólk í flutningsvinnuni og orkufeløgum boðað frá, at tey fara eisini í verkfall. Eygleiðarar siga, at hetta kann enda sum tað størsta verkfallið í Fraklandi seinastu tíggju árini.